| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 01. Mai 2014 |
| Býráðsfundur nr. | 06/2014 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2014 tann 01. mai kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá virkandi borgarstjóranum Magnus S. Midjord, dagfest 24. apríl 2014 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Birgir Petersen

Árant Berjastein hevði forhall til fundin vegna arbeiði.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 12/2014.**

**Mál viðvíkjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri ár 2015.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Søvn landsins, dagf. 07. juni 2013 um innlatingarfreist fyri at lata inn fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri rakstrarárið 2015.

Mentamálanevndin hevur móttikið uppskot frá kommunalu fyrisitingini, dagfest 10. apríl 2014 til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri **árið 2015**.

Sambært uppskotinum verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar mettar til kr. 831.918,00 móti mettum kr. 863.000,00 í 2014, og er sostatt talan um eina lækking upp á kr. 31.082,00, svarandi til 3,6%.

Inntøkurnar av rakstrarstudningi verða mettar til:

| | | |
|---|---|---|
| Fuglafjarðar kommuna | kr. 499.150,80 | |
| Landskassastudningur | kr. 332.767,20 | |
| | **Samantals** | **kr. 831.918,00** |

Sum tað sæst, so er lutfalsbýtið millum landskassa og kommunukassa í samsvar við nýggju bókasavnslógina,har býtið millum land og kommunu verður 60% í kommunurnar part og 40 % í Landskassans part. Áðrenn broyting varð gjørd í bókasavnslógini var býtið 40% í kommunurnar part og 60% í landskassans part.

Kommunan hevur tó bert fingið kr. 170.022,00 í landskassastuðli fyri 2013 sjálvt um fíggjarætlanin fyri sama ár hevur eina rakstrarætlan upp á kr. 763.529,00, og roknskapurin fyri 2013 hevði rakstrarútreiðslur upp á kr. 736.627,24, sum annars skuldi givið Bókasavninum ein rakstrarstuðul upp á kr. 294.650,90.

Soleiðis góðkennir Føroya Landsbókasavn, sum nú er, ikki eina fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar Bókasavn, sum er størri enn kr. 425.056,00.

Um gongdin verður tann sama, so kann kommunan ikki rokna við einum rakstrarstuðli upp á kr. 332.767,20, sum henda fíggjarætlan leggur upp til, men við staðfesting kr. 170.022,00, so munurin kr. 162.745,20 kemur kommunan sjálv at bera, so lutfalsbýtið kemur helst at verða 80% til kommununa og 20%-um til landskassan.

Ætlanin hevur verið fyri á fundi í Mentamálanevndini tann 15. apríl 2014 og varð samtykt at taka undir við málinum og mæla býráðnum til at samtykkja uppskotið til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2015, ásannandi at rakstrarstuðulin ikki verður 40% av teimum kr. 863.000,00, men heldur 40% av kr. 425.056,00.

Somuleiðis mælir nevndin til at senda skriv til teknisku nevndina um at fáa tett lekan á Bókasavninum, so umvælingin kann verða gjørd.
Avgerð:
Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.30.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Birgir Peteresn

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen